# Ivan Johansen Bilar - nútímans Dinitrol rustviðgerð

**Bilasølan hjá Ivan Johansen var ein tann fyrsta sum tók sær av at rustviðgera bilar í Føroyum. Teir byrjaðu í sjeytiárunum, tá fyritøkan helt til á Lágarvegnum, og tá nýggi virkisbygningurin varð bygdur við Hoyvíksvegin, fingu teir sera góðar umstøður at rustveðgera bilar**



Tveir til tríggir bilar verða viðgjørdir dagliga á Dinitrol deildini Ivan Johansen við Hoyvíksvegin. Her er Kaj við at rustviðgerða ein nýggjan bil

RUSTVIÐGERÐ
*Magnus Gunnarsson*

Stórur munur er á, hvat bilarnir halda betur í dag, enn teir gjørdu fyri umleið 30-40 árum síðan. Bæði orsaka av at bilarnir eru betri gjørdir, vegirnir eru betri og rustviðgerðin er munandi betur. Bilverkstaðurin hjá Ivan Johansen hevur gingið á odda innan hetta øki, og hava teir eina nútímans høll til rustviðgerð.

## 2-3 bilar dagliga

Best er at bilarnir verða rustviðgjørdir skjótast møguligt, helst tá teir eru nýggir. Nýggir bilar eru reinir undir botninum og nýtast ikki at reinsast áðrenn teir skulu viðgerast, sigur Kaj Boetius, sum hevur Dinitrol rustviðgerina um hendur. Hann rustviðgerð dagliga 2-3 bilar, alt eftir um tað eru nýggir ella gamlir bilar, og um teir eru smáir ella stórir. Bilar sum koyra á føroysku vegunum blíva ómetaliga skitnir um veturin. Teir hava eisini avtalur við fleiri aðrar bilhandlarar um at rustviðgera teirra bilar.

## Kannaðir hjá FDM

Kaj Boetius, ið er útbúgvin sertifikatsveisari, hevur luttikið á skeiðum fyri sproytuoperatørar hjá Teknologisk Institutt. Bilar, sum teir hava viðgjørt, hava verið hjá FDM, í Danmark, til eftirkanningar. Skotsmálið teir fingu frá FDM, var, at har var onki at viðmerkja og arbeiðið var væl úr hondum greitt. Nýggir bilar, ið koma til rustviðgerð, verða lidnir sama dag, meðan bilar sum skulu reinsast áðrenn viðgerðina, standa 2 til 3 dagar, alt eftir hvussu umfatandi arbeiðið er.




*Kaj Boetius, sum hevur Dinitrol rustviðerðina um hendi, er dani og hevur búð í Føroyum síðan 1966. Hann býr í Klaksvík. Kaj fer upp kl 5 um morgunin og er heima aftur um sjeytiðina um kvøldið*




*Hesi kortini innihalda nágreiniligar upplýsingar um konstruktiónina í bilinum og hvørji amboð ið skulu brúkast. Hetta kortið er til Mercedes E-klassan frá 1995*



BMW 3-røðin:

# »Andlitsviðgjørdur« BMW

**BMW 3-arnir eru komnir á marknaðin við fleiri smærri og størri broytingum. Kølaragittari er nýtt, nýggjar forlyktir, lægri spoilarar og aðrar smærri broytingar við blinkljósunum framman og baklyktunum. Nýggir bensin og dieselmotorar og munandi betri koyrieginleikar**



*BMW 3-arnir síggja nakað øðrvísi út í nýggjastu útgávuni. Umframt designbroytingarnar hava teir nú fingið størri motorar og betri koyrieginleikar.*

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

BMW 3-arnir síggja nakað øðrvísi út í nýggjastu útgávuni.Umframt designbroytingarnar uttan, hava allar útgávurnar fingið betrað fjaðraskipanina og meira kontanta stýring. Hesar broytingar geva bilinum meira sportligar koyrieginleikar enn hann hevði áðrenn. Aircondition er nú standard í flestu 4 syl. útgávunum.

BMW 318i hevur fingið ein heilt nýggjan 2.0 litur bensinmotor og 143 hk við einum snúningsmomenti uppá 200 Nm. Talan er um ein Valvetronic motor við heilautomatiskari broytiligari ventilskipan. Úrslitið er ein motorur við 21 prosent meira kraft, er 16 prosent meira orkusparandi og dálkar tilsvarandi minni. 2.0 litur dieselmotorurin í BMW 320d fær nú commomrail innspræning við 150 hk og einum snúningsmomenti uppá 330 Nm.

Heimsins besti ...
BMW 520i



BMW 5-sniði er nevndur sum heimsins besti bilur í 6 ár á rað í enska bilblaðnum "What Car?"
sí www.bmw.dk



Sum standar hevur bilurin nógva útgerð, so sum navigatiónsútstýr, anti spinn, klimaanlæg og ein langan útstýrs lista, sum er ov langur til hesa lýsing.

Er á goymslu, prísur frá kr. 388.600,-

Bilfríðkan við Velbastaðvegin
Postboks 1034 - FO 110 Torshavn - Tlf 317300 - www.bilfridkan.fo

FIAT Stilo
Italskt fyri framkomin





Er á goymslu, prísur frá kr. 166.600,-

Bilfríðkan við Velbastaðvegin
Postboks 1034 - FO 110 Torshavn - Tlf 317300 - www.bilfridkan.fo